





# REKTARI TIL SKÚLADEPILIN Í MARKNAGILI

Hevur tú hugsjónir um skúlaskap, serliga við atliti at breiddini í miðnámsútbúgvingum og ynskir at slóða fyri fakligari og námsfrøðiligari menning innan økið, hevur tú nú møguleika at bjóða teg fram til avbjóðandi leiðarastarv sum rektari á Skúladeplinum í Marknagili.

Skúladepilin í Marknagili verður ein skúli, ið skal hýsa bæði yrkisligum og gymnsialum miðnámsútbúgvingum umframt øðrum undirvísingarvirksemi - ætlandi frá 1. august 2016.

Rektarin hevur mótvegis landsstýrismanninum ábyrgdina av øllum virkseminum í skúladeplinum.

Frá setan skal rektarin standa á odda fyri fyrireikingini av framtíðar virkseminum í nýggja skúladeplinum. Stjórarnir í skúlunum, sum flyta í skúladepilin, vísa frá byrjan til nýggja rektaran, og saman skulu hesi leggja virksemið fram til flytingina til rættis eftir nærri ásettum avtalum.

Rektarin skipar bygnaðin í skúladeplinum, setir leiðarar og stendur fyri samansjóðing av starvsfólkunum í verandi skúlum, sum øll flyta við í komandi skúladepilin.

## ÁBYRGD OG UPPGÁVUR

Rektarin hevur ovastu leiðsluábyrgdina av øllum virkseminum í skúladeplinum, herundir fakliga, námsfrøðiliga, umsitingarliga og fíggjarliga ábyrgd. Rektarin skal mynda Skúladepilin í Marknagili á ein sannførandi hátt og virka fyri góðum og mennandi arbeiðs- og lestrarumhvørvi, har ymsu útbúgvingarnar fáa hóskandi og javnbjóðis umstøður at virka undir.

Rektarin skal standa á odda fyri tilgongdini at skipa bygnaðin í skúladeplinum, samansjóða starvsfólkahópin og tryggja gott samstarv við allar partar. Flytingin skal leggjast til rættis, og nýtslan av nýggja skúlabygninginum skipast. Rektarin skal virka fyri góðum samstarvi við skúlar, vinnuna, myndugleikar o.o.. Saman við depilsráðnum skal rektarin skipa karmarnar fyri yrkisfakligu útbúgvingarnar og inntøkufíggjaða virkseminum í skúladeplinum. Saman við Mentamálaráðnum skal rektarin menna útbúgvingar skúlans, so tær alsamt lúka framtíðar og altjóða krøv.

Rektarin hevur fíggjarligu ábyrgdina, skal leggja fíggjarætlan stovnsins og skipa ein skynsaman rakstur við neyvari fíggjarstýring. Rektarin setir í starv og loysir úr starvi leiðarar, lærarar og onnur starvsfólk.

## PERSÓNURIN

Rætti persónurin til rektarastarvið skal hava hug og hegni at leiða og skal kenna egnar dygdir og avmarkingar. Tað er týdningarmikið, at rektarin hevur evni og vilja at samstarva og samskipa, men samstundis styrkina at kunna standa eina í mótstøðu, uttan at missa fótafestið.

Starvið krevur, at tú skjótt dugir at skapa tær eitt yvirlit í skiftandi støðum og megnar at røkka settum málum. Tú skalt vera framskyggin og hava evni og áræði at ganga nýggjar leiðir.

Tú skalt hava góð evni at sjóða saman fólk og við einum stimbrandi leiðsluhátti at birta eldhuga millum hesi. Tú skal síggjast í starvinum og skapa virðing og trivna innanhýsis millum starvsfólk og næmingar umframt uttanhýsis við samstarvspartar o.o.. Umráðandi er at skapa trúvirði, vera álítandi og duga væl at lýsa egin sjónarmið. Tú skalt evna innliving og virðing fyri hugskotum og sjónarmiðum hjá øðrum.

## FØRLEIKAR OG ROYNDIR

Tað er eitt krav, at rektarin hevur:

- viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni
- leiðslu- og fyrisitingarligar royndir
- royndir og førleika at undirvísa
- góð evni at samskifta og orða seg á føroyskum, skandinaviskum og enskum.

Harumframt er tað ein fyrimunur, at rektarin hevur:

- leiðsluútbúgving við innliti í bygnaðarskipan
- royndir frá bygnaðarligari samanleggingartilgongd
- royndir frá luttøku í størri byggiverkætlan.

## SETANAR- OG LØNARTREYTIR

Starvið er flokkað samsvarandi 39. lønarflokki sambært Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv. Lønin er í løtuni kr. 54.339,50 umframt 15 % í eftirløn um mánaðin.

## UMSÓKN

Umsókn við CV, prógvum o.ø. skal sendast til:
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postsmoga 3279
110 Tórshavn
Ella sum t-postur til mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 4. mai 2015. Starvið verður sett 1. juni 2015 ella eftir nærri avtalu.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Poul Geert Hansen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, á tlf. 555010 ella t-post PoulGeertH@mmr.fo

KREA

Skúladepilin í Marknagili er størsta skúlabygging í Føroya søgu. Bygningurin verður slakar 20 túsund fermetrar til støddar og fer at hýsa umleið 1.300 næmingum og 200 starvsfólkum. Skúladepilin leggur upp til opinleika og smidleika, har lærarar og næmingar samstarva tvørtur um útbúgvingar og breytir, so depilin verður karmur um eina skapandi, fjølbroytta og nýhugsandi undirvísing.

Skúlarnir, sum flyta í Skúladeplin í Marknagili, eru: Føroya Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum, Føroya Handilsskúli í Tórshavn og Tekniski Skúli í Tórshavn.

MENTAMÁLARÁÐIÐ